## Menningarlond keypa vápn úr USA

Nýggj hagtøl hjá amerikonsku kongressini vísa, at umleið 60 prosent av øllum vápnum, sum USA selir, fara til lond í triðja heiminum. Talan er um at kalla øll vápnasløg so sum stríðsvognar, flogfør, rakettir og kavbátar.

Búskaparligir trupulleikar ymsastaðni hava gjørt, at amerikanska vápnasølan er minkað tey seinastu árini. Í 2000 seldu amerikanarar vápn fyri slakar 300 milliardir krónur, men í fjør var talið niðan fyri 270 milliardir. Av hesum keyptu menningarlondini fyri góðar 65 milliardir krónur, og tey størstu keyparalondini í fjør vóru Kina, Egyptaland og India. Menn onnur lond keyptu eisini amerikanska hernaðarútgerð. Eitt nú keypti Taiwan radaraskipanir, Brail og Ísrael keyptu tyrlur, og lond sum Oman og Pakistan keyptu ymisk vápn.

Sambært tølunum hjá kongressini keypa menningarlondini 42 prosent av sínum vápnum úr USA, og hesin handilin er vaksin serliga nógv síðani Flógvakríggið í 1991, sigur kongressin.

## Ken skal svara

Tann umstríddi borgarstjórin í London, Ken Livingstone, er enn eina ferð vorðin umrøðuevni í fjølmiðlunum.

Hesaferð skal hann til avhoyringar, tí hann hevur borið ein jødiskan tíðindamann saman við fangavørð í teimum nazistisku týningarlegunum undir seinna heimsbardaga. Løgfrøðingar í Bretlandi siga, at málið kann enda við, at Livingstone missir rættin at røkja almenn arbeiði í fimm ár, men tí kann hann sleppa undan, um hann alment viðgongur, at hann leyp framav.

Tilburðurin, sum málið snýr seg um, var undir einari móttøku fyri samkyndum í London herfyri. Undir móttøkuni spurdi tíðindamaðurin Oliver Finegold borgarstjóran, hvat hann helt um tey samkyndu. Livingstone svaraði við at spyrja tíðindamannin, um hann var týskur krígsbrotsmaður. Tá tíðindamaðurin svaraði, at hann var jødi, segði Livingstone:

– Tú ert júst sum ein fangavørður í einari týningarlegu. Tú gert hetta, tí tú fært pengar afturfyri, ikki so?

## Grið 60 ár ov seint

Fyri 60 árum síðani bleiv svarta kvinnan Lena Baker avrættað í elektriska stólinum í amerikanska statinum Georgia, tí hon hevði skotið ein hvítan mann. Sjálv helt Lena Baker uppá, at hon var ósek, og at hon hevði skotið mannin í sjálvverju. Fyrradagin fekk hon viðhald – 60 ár ov seint.

Lena Baker tænti hjá tí hvíta E. B. Knight. Hon vildi sleppa frá honum, men hann læsti hana inni og hótti við at drepa hana, um hon rýmdi. Í rættinum greiddi hon frá, at ein dagin leyp maðurin ímóti henni við einari jarnstong í hondini. Hon hevði ikki annað í at velja enn at verja seg, so hon tók byrsuna og skjeyt hann.

Í rættinum kom málið fyri eitt nevningating. Allir nevningarnir vóru hvítir, og teir gjørdu av at døma hana til deyða fyri tilætlað morð. Tann 5. mars í 1945 bleiv Lena Baker sett í tann elektriska stólin. Hon er tann einasta kvinnan í Georgia, sum er avrættað í elektriska stólinum.

## Stór flóðalda tók teir

Indisku systkinabørnini Altaf Patet og Sahaj Yusuf fingu ein rættiligan hvøkk, tá teir nú um dagarnar fóru á eina rundferð í suðurafrikanska býnum Cape Town.

Teir gjørdu av at fara oman í havnina í Kalk Bay at hyggja seg um, men brádliga kom ein ovurstór flóðalda og tók teir. Men eydnan var við teimum, tí nakrir fiskimenn høvdu sæð, hvat var hent, og tað eydnaðist teimum at bjarga teimum báðum ferðamonnunum.

Altaf Patet og Sahaj Yusuf greiddu frá, at teir høvdu ikki varnast eitt skelti, sum ávarar fólk ímóti flóðaldunum, men sambært bjargingartænastuni høvdu fiskimenninir ávarað teir, áðrenn teir fóru oman í havnina.

UTTAN ÚR HEIMI

# Helst fleiri hundrað deyð



*Nógvastaðni í New Orleans er so nógv vatn í gøtunum, at bara húsatekjurnar koma undan*

**Bjargingarliðini royna at bjarga teimum, sum eru á lívi, men tey hava hvørki stundir ella umstøður til at taka sær av teimum deyðu**

ÓDN
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Eingin veit, hvussu mong mannalív ódnin »Katrina« kravdi, tá hon herjaði amerikonsku suðurstatirnar. Myndugleikarnir søgdu í gjár, at í Biloxi-økinum í Mississippi vóru umleið 80 fólk vóru funnin deyð, men Haley Barbour, guvernørur, segði seg bera ótta fyri, at tað veruliga talið er uttan iva nógv størri.

Í New Orleans stríddust bjargingarlið, løgreglan og tjóðarhirðin við at bjarga fólki, sum høvdu leitað sær skjól uppi á húsatekjum og aðrastaðni. Fyrradagin vórðu umleið 1200 fólk bjargað við tyrlum, og í gjár tóku tyrlur og bjargingarbátar fleiri túsund fólk upp. Eingin veit, hvussu mong eru deyð í New Orleans, men myndugleikarnir stúra fyri, at eisini har kunnu fleiri hundrað hava latið lív.

Bjargingarliðini leggja seg eftir at bjarga teimum, sum eru á lívi. Reuters skrivaði í gjár, at bjargingarliðini hava hvørki stundir ella útgerð til at taka sær av teimum deyðu. Koma teir fram á eini hús, har fólk liggja deyð inni, verður reyð máling smurd upp á húsini, og so heldur leitingin fram í teimum næstu húsunum.

Í gjár vóru bjargingarliðini framvegis ikki sloppin til fleiri øki fram við sjálvari strondini, tí alt lendið stendur undir í vatni.

Umleið 80 prosent av New Orleans standa undir í vatni, og vatnið bara veksur, tí hol er komið á byrgingina við Pontchartrain-vatnið. Holið var umleið 60 metrar langt, og í gjár royndu serfrøðingar hjá amerikanska herinum at tetta tað. Bjargingarliðini siga, at summastaðni í býnum stendur vatnið fleiri metrar oman fyri gøturnar, og nógvastaðni koma bara húsatekjurnar undan.

Samstundis bendir alt á, at »Katrina« er tann dýrasta ódnin, sum nakrantíð hevur herjað USA. Í gjár mettu tryggingarfeløgini, at ódnin hevur gjørt skaða fyri einar 26 milliardir dollarar.

Tað er heldur eingin ivi um, at »Katrina« er tann ódnin, sum hevur kravt flest mannalív í USA. Tá »Camille« herjaði Mississippi í 1969, doyðu 256 fólk, men alt bendir á, at talið hesaferð er størri og kanska væl størri.

# Al-Qaeda fyrireikar álop í Evropa

**Tann irakska greinin av yvirgangsfelagsskapinum ætlar at søkja at málum í Evropa**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Amerikanska tíðarritið Time vil vera við, at Abu Musab al-Zarqawi stendur á odda fyri bólkinum, sum fyrireikar seg til at søkja at málum í Evropa. Blaðið sigur seg hava tíðindini frá einari evropeiskari fregnartænastu.

Sambært kelduni skal al-Zarqawi hava havt fund við bólkar í Turkalandi, eins og hann skal hava havt fund við deildir hjá al-Qaeda í Irak. Harafturat skal hann hava fylgt við, hvussu menn verða vandir til atsóknirnar í Evropa.

Tann kendi franski yvirgangsserfrøðingurin Roland Jacquard sigur við Time, at vandi er fyri, at óvandir bólkar í Evropa fáa samband við væl vandar og royndar bólkar hjá al-Qaeda, og at teir lata seg ávirka av monnum sum al-Zarqawi.

Abu Musab al-Zarqawi, sum er ættaður úr Jordan, verður hildin at hava skipað fyri ófriðinum í Irak, og amerikanararnir hava lovað at gjalda 20 milliónir krónur í finningarløn, verður hann avdúkaður.